## Litevni elvir til ovurvirkni

Vit hava vita tað leingi, men nú er tað prógvað. Børn verða ófriðarlig og ovurvirkin av at eta sodavatn og bomm. Eftir at kanningar hava staðfest sambandið millum litevni og ovurvirkni, hava bretskir myndugleikar valt at ráða foreldrum frá at geva børnum sínum mat við litvni í. Kanningar eru gjørdar av E102, E104, E110, E122, E124 og 129. Hesi evni eru serliga at finna í bomm, sodavatni og ísi. Atferðartrupuleikarnir hjá kannaðu børnunum vístu seg bæði í skúlanum og við hús. Danska blaðið Metro-Xpress skrivar, at bretska Food Standards Agency hevur gjørt nýggjar tilráðingar. Litevni er ikki einasta orsøk til ovurvirkni, men hetta er so ein, sum vit kunnu gera nakað við, siga granskararnir.




## Windows Live

Sum væntað kemur Microsoft nú á marknaðin við nýggjum Live-pakka, sum kann takast niður av netinum. Í nýggja pakkanum eru forrit sum Windows Live Mail og Messenger, leitiskipanir og eisini ein trygdarskipan. Flestu skipanirnar í pakkanum eru eisini gjørdar so, at tær kunnu samskifta við skipanir, sum ikki eru av Windows-uppruna. Tá forritið verður lagt á teluna, kann brúkarin velja, hvørt einstøku forritini skulu leggjast inn.

Nú er tað váttað:

# Fimm valevni til nýggjan bisp



*Triðja oktobur fáa vit at vita, hvør verður nýggjur bispur og ovasti embætismaður kirkjunnar*

**Bispur váttar nú, at fimm valevni er til at taka við eftir hann**

BISPAVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hans Jacob Joensen, bispur sigur, at tá ið fráboðanarfreistin var úti 3. september, varð boðað frá hesum valevnum til bispavalið í heyst.

Tey eru Marjun Bæk, prestur í Kvívík, Jógvan Fríðriksson, prestur Innan Glyvur, Jákup Reinert Hansen, prestur á Sandi, Bergur Debes Joensen, prestur á Argjum og Uni Næs, prestur í Fuglafirði

Valstýrið hevur gjøgnumgingið, kannað og góðkent allar fimm fráboðanirnar, sigur bispur.

Valstýrið hevur gjørt vallista og eftir hesum lista verður tilfarið til atkvøðugreiðsluna sent beinleiðis til hvønn einstakan, ið hevur atkvøðurætt. Tilfarið til atkvøðugreiðsluna verður sent mikudagin.

Treytin fyri at kunna atkvøða er, at viðkomandi stendur á vallistanum. Fólk, ið halda seg hava rætt at atkvøða, men sum ikki hava fingið tilfar til atkvøðugreiðsluna, og fólk, sum av misgáum hava fingið tilfar til atkvøðugreiðsluna, verða bidnir um at boða valstýrinum frá mistakinum í seinasta lagi fríggjadagin 21. september. Valstýrið heldur til í Bispaskrivstovuni.

Freistin at atkvøða er úti tríggjar vikur eftir, at tilfarið til atkvøðugreiðsluna er sent og atkvøðurnar verða kannaðar og taldar mikudagin 3. oktober í Bispagarðinum.





Slóðin er bústovnur í Havn fyri ung við trupulleikum, normeraður til fimm ung 13-18 ár. Í løtuni starvast umframt leiðara, 5 starvsfólk á stovninum í dag-, kvøld-, og vikuskiftisvaktum. Eitt pedagogstarv skal setast afturat frá 1. oktober, ella skjótast til ber.

Trupulleikarnir hjá teim ungu kunnu vera av ymsum slagi, sosialum, kensluligum og/ella sálarligum. Tað hevur við sær, at hesi ungu ofta eru læst fast í negativum søgum um seg sjálvi. Pedagogiska arbeiðið snýr seg tí um - í samstarvi við netverkið - at geva teim ungu umsorgan og mennandi umstøður. Hetta, fyri at vit saman við tí einstaka unga finna fram til førleikar, og soleiðis skapa eina jaligari søgu, sum ger, at tey ungu við størri sjálvsvirði kunnu koma víðari við teirra vónum og dreymum, og við treysti megna at taka ábyrgd av egnum lívi í framtíðini.
Vit vænta av tær, at tú arbeiðir sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og ung. Eisini vænta vit, at tú møtir teim ungu og familjum teirra við viðurkenning og virðing, at tú ert fleksibul, og megnar, at tú ikki altíð veitst, hvørjum avbjóðingum, tú verður møttur av í gerandisdegnum, at tú torir at siga tína meining og at fara í holt við ósemjur, og at tú ert opin fyri fakligari menning. Tað er ein fyrimunur um tú hevur koyrikort og dugir væl at formulera teg skrivliga og munnliga. Eisini er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir á hesum øki, praktiskt og fakliga.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Guðrun Eysturlíð, virkandi leiðara, á tel. 315030, ella 215031.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:
Almannastovuna, Smyrilsveg 20,
Postrúm 3096, 110 Tórshavn,
í seinasta lagi 19. september 2007.

Gerið so væl at merkja brævbjálvan: "Slóðin"

KREA.FO


Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!